# INNIHALDSYVIRLIT

1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS........3
2. INNGANGUR........4
3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN........5
3.1 Støðan í altjóða búskapinum........5
3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum........7
3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin........10
4. FØROYSKI BÚSKAPURIN........12
4.1 Gongdin í samlaða virkseminum........12
4.2 Gongdin í privata vinnulívinum........15
4.3 Gongdin í privata húsarhaldinum........17
4.4 Gongdin í almenna búskapinum........19
4.5 Gongdin í fólkatalinum........21
4.6 Gongdin í arbeiðsloysinum........22
4.7 Gongdin í brúkaraprístalinum........23
4.8 Gongdin í fíggjar sektorinum........24
4.9 Gongdin á handilsjavna og uttanlandsskuld........25
4.10 Framtíðarútlitini fyri føroyska búskapin........29
5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2007........30
5.1 Búskaparpolitikkurin 2007........30
5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2007........30
5.3 Gongdin í inntøkum landskassans........31
5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans........33
5.5 Raðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2007........34
5.6 Løgur 2007........39
5.7 Gongdin í skuld landskassans........41

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

# 1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS

Búskaparpolitikkurin hjá samgonguni um at tálma sveiggjum í búskapinum hevur eydnast og føroyingar hava álit á framtíðini. Tað hevur tí týdning at tryggja vøksturin við at reka ein stramman fíggjarpolitikk.

Seinnu árini hevur búskapurin verið merktur av stagnatión, men hevur annars verið grundleggjandi sunnur, og tí er vøksturin væl grundaður. Ekspansivi og arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkurin seinnu árini hevur tí virkað og tænt sínum endamáli.

Í 2007 verður busketterað við einum avlopi á fíggjarlógaruppskotinum (RLÚ-úrslitið) á 74,5 mió. kr. Hóast roknað varð við halli á fíggjarlógaruppskotinum 2006, ber framgongdin í búskapinum í sær, at avlop væntandi verður á landsrokn-skapinum longu í ár.

Í stuttum verða familjan, útbúgvingarøkið, eldraøkið og samferðsluøkið raðfest ovarlaga í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2007.

Virksemið er stórt, og tørvur er á arbeiðsmegi, serliga innan byggivinnuna. Tað hevur tí stóran týdning, at landið ikki økir sín eftirspurning ov nógv og harvið stimbrar búskaparliga virksemið, soleiðis at føroyski búskapurin verður ovhitaður.

Trygga politiska støðan skapar álit og hevur saman við einum skynsomum bú-skaparpolitikki givið dirvi og trúgv uppá framtíðina. Vinnulívið er í dag framfýsið og hevur vilja til at royna seg í øðrum vinnum og marknaðum, og dynamikkurin hevur sjáldan verið størri enn í dag. Hetta gevur vónir um, at vit koma at síggja enn fleiri nýggjar vinnuspírar í framtíðini.

***Bárður Nielsen***

# 2. INNGANGUR

Endamálið við hesi frágreiðingini er at skapa betri grundarlag fyri viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum.

Frágreiðingin byrjar við at lýsa gongdina í altjóða búskapinum og ymiskum viðurskiftum, ið hava týdning fyri gongdina og útlitini. Eisini er ein serlig lýsing av gongdini og útlitunum fyri norðurlendsku búskapirnar.

Næsti parturin í frágreiðingini er ein meira nágreinilig lýsing av gongdini og útlitunum í føroyska búskapinum. Gongdin og útlitini í ymiskum týdningarmiklum pørtum í føroyska búskapinum verða lýst við tí vitan og tølum, ið vóru tøk í september 2006.

Triði parturin er um fíggjarlógaruppskotið og búskaparpolitikkin í fíggjarlógaruppskotinum 2007. Ymsar greiningar eru av inntøkum og útreiðslum landskassans seinastu árini.

Í hesum partinum er eisini eitt stutt yvirlit yvir, hvørjar játtanarligar broytingar eru á málsøkjunum hjá hvørjum einstøkum landsstýrismanni frá fíggjarlógini 2006 til fíggjarlógaruppskotið 2007. Nærri viðmerkingar og grundgevingar fyri broytingunum á einstøku játtanunum eru í viðmerkingunum til hvørja einstaka høvuðskontu í fíggjarlógaruppskotinum.

# 3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

## 3.1 Støðan í altjóða búskapinum

Vøksturin í altjóða búskapinum er framvegis stórur. Altjóða BTÚ[1]-vøksturin verður í 2006 mettur til 4,7% og í 2007 verður hann mettur til 4,4%. Vøksturin í heimsbúskapinum verður sostatt eitt sindur lakari í 2007.

Vøksturin í altjóða búskapinum er framvegis myndaður av stórum vøkstri í Eysturasiu, Latínameriku, Norðurafriku og Miðeystri. Í Kina var vøksturin 11% fyrra hálvár í ár.

Vøksturin í USA er minni nú enn hann hevur verið. Í 2004 var vøksturin í USA omanfyri 4%. Í øðrum ársfjórðingi í ár var vøksturin 2,5%. Arbeiðsloysið vaks eitt lítið vet  í juli og líkt er til, at høgu oljuprísirnir fyrr í ár og í summar eru farnir at síggjast aftur í kjarnuinflasjónini.[2] Vøksturin í USA fer tí neyvan at verða líka stórur í ár sum hann var í 2004 og 2005.

Vøksturin í Evrulondunum verður væl størri í ár enn í fjør, tá hann var 1,4%. Mett verður, at vøksturin í Evrulondunum verður 2,3%[3] í 2006 og 2,2% í 2007. Orsøkin til at vøksturin minkar í 2007 er m.a., at týskarar hava ætlanir um at hækka meirvirðisgjaldið 1. januar 2007. Metingarnar um vøksturin í Evrulondunum í ár eru grundaðar á hægri innlendskan eftirspurning.

Tað er stórur fíggjarligur ójavni í altjóða búskapinum. Risastóra gjaldsjavnahallið í USA vigar upp ímóti eins stórum gjaldsjavnaavlopum í oljuútflytaralondunum og fleiri asiatiskum londum, serliga Kina. Í Evropa javnvigar nøkulunda.

[1] Bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, er eitt mát fyri vinnuligu inntøkuskapanina, sum framleiðsluvirðið minus rá- og hjálpievni.

[2] Kjarnuinflasjónin er inflasjónin uttan prísirnar á orku og ótilgjørdum matvørum.

[3] OECD metir, at vøksturin í Evrulondunum kann fara at verða væl omanfyri 2,3% í 2006. Hetta er m.a. grundað á heimsmeistaraskapi í fótbólti í Týsklandi og at tað væntandi verður eitt boom í týsku nýtsluni síðst í árinum, áðrenn týska meirvirðisgjaldið hækkar 1. januar 2007.

Vaksandi oljuprísirnir hava økt um ójavnan, tí oljuútflytaralondini hava fingið størri avlop samstundis sum amerikanski gjaldsjavnin er komin undir størri trýst. USA innflytur 60% av síni oljunýtslu. Vaksandi ójavnin er vorðin ein hóttan ímóti altjóða búskaparvøkstrinum. Missa íleggjarar áhugan fyri amerikanskum virðisbrøvum verður trupult at fíggja hallið á amerikanska gjaldsjavnanum. Dollarin viknar og lága langfreistaða rentan verður trýst uppeftir.

Nýggjar metingar um dollarkursin siga, at miðal dollarkursurin verður 5,98 kr. í 2006 og 5,87 kr. í 2007. Hetta er lægri enn í 2005, tá ið miðal dollarkursurin var 6,00 kr. Í løtuni liggur dollarkursurin um 5,80 kr.

Um órógvin á fíggjarmarknaðinum minkar um innlendska eftirspurningin í USA, verður neyvan møguligt at halda honum uppi við ekspansivum fíggjarpolitikki, tí stórt hall er á amerikansku buskettinum frammanundan.

Amerikanski pengapolitikkurin hevur seinastu tvey árini verið tálmandi. Síðan juni 2004 hevur amerikanski miðbankin framt 17 rentuhækkingar á 0,25%. Stuttfreistaða pengapolitiska rentan er tí hækkað úr 1% upp í 5,25%. Amerikanski miðbankin hevur ikki framt fleiri rentuhækkingar á teimum seinastu rentufundunum, sum vóru í august og september. Stuttfreistaða rentan í USA er tí framvegis 5,25%. Langfreistaðu renturnar eru nakað lægri.

Síðan desember 2005 hevur evropeiski miðbankin, ECB, framt 4 hækkingar á 0,25% av pengapolitisku rentuni. Í løtuni verður mett, at tað koma tvær rentuhækkingar á 0,25% afturat, tann fyrra í heyst og tann seinna á sumri 2007. Tað er møguligt, at ein rentuhækking eisini kemur í endanum í hesum árinum. Henda metingin er grundað á stevnumiðið um, at inflasjónin í Evruøkinum í mesta lagi skal vera 2% p.a. Inflasjónin er í løtuni omanfyri 2% og tí verður hildið, at ECB fer at fremja fleiri rentuhækkingar fyri at fáa inflasjónina niður.

Oljuprísurin hevur verið høgur í 2006. Í august var oljuprísurin omanfyri 78 $ fyri tunnuna, men er síðan fallin til umleið 60 $ fyri tunnuna. Høvuðsorsøkin til at

oljuprísurin hevur verið so høgur, er spenta støðan í miðeystri og at eftirspurningurin er nógv størri enn verandi framleiðsluorka megnar at framleiða, m.a. orsakað ódnini í USA fyri góðum ári síðan og stórum vøkstri í Kina og øðrum londum.

Oljuprísurin er fallin rættiliga nógv aftur seinastu vikurnar og tað er ymiskt, ið bendir á, at oljuprísurin í løtuni kann fara at halda sær í eina tíð.

Hetta kemst m.a. av, at oljuprísurin liggur langt omanfyri marginalkostnaðin[4] fyri at framleiða ráolju. Oljuprísurin er eisini langt omanfyri kostnaðin á alternativum orkukeldum. Tað er tó trupult at siga nakað um, hvussu langa tíð tað tekur at økja um framleiðsluorkuna, soleiðis at munurin millum eftirspurning og útboð minkar.

Hetta eru m.a. grundgevingarnar fyri, at altjóða orkustovnurin IEA[5] metir, at høgi oljuprísurin í summar ikki fór at halda sær. Spenta støðan í Iran er eisini linka nakað í seinastuni.

Henda metingin skal tó takast við fyrivarni, tí mest bjartskygdu oljumarknaðarserfrøðingarnir hava mett, at oljuprísurin frameftir fer at liggja um 40 $ fyri tunnuna, meðan teir mest svartskygdu serfrøðingarnir hava mett, at prísurin fer at liggja um 180 $ fyri tunnuna. Hetta vísir, hvussu trupult tað er at siga nakað um oljuprísin frameftir.

## 3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum

Rættiliga stórur vøkstur hevur verið í norðurlendsku búskapunum seinastu árini, sí talvu 3.1. Privata nýtslan hevur verið drívmegin í vøkstrinum. Hetta hongur saman við lágari rentu, reallønarvøkstri og at virðini á fastari ogn eru nógv vaksin, tí

[4] Vøksturin í samlaða framleiðslukostnaðinum, tá framleiðslan verður økt við einari eind, t.d. samlaði vøksturin í oljuframleiðslukostnaðinum, tá framleiðslan verður økt við einari tunnu av olju. Í einum fullkomnum marknaðarbúskapi eigur marginalkostnaðurin at vera prísurin á oljutunnuni.

[5] International Energy Agency.

stórur vøkstur hevur verið í bústaðarprísunum. Stórur vøkstur er eisini í útflutningsvirðinum.

Konjunkturframgongdin hevur havt við sær, at arbeiðsloysið í Norðurlondum er lítið, Finnland undantikið. At útvega arbeiðsmegi er vorðin ein felags trupulleiki í Norðurlondum. Inflasjónin er lág í øllum Norðurlondum, uttan í Íslandi, sí talvu 3.2. Øll londini uttan Ísland hava avlop á gjaldsjavnanum og Norðurlond hava øll avlop á almenna buskettinum,[6] sí talvu 3.3. Mett verður, at samlaða bruttotjóðarúrtøkan í Norðurlondum veksur 3,3% í ár og 2,5% í 2007. Hetta er hægri enn í Evruøkinum.

**Talva 3.1: Árligur BTÚ-vøkstur í evru- og norðanlondum**

| *BTÚ-vøkstur í %* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|
| Evrulondini | 0,7 | 1,8 | 1,4 | 2,3 | 2,2 |
| Svøríki | 1,7 | 3,7 | 2,7 | 3,6 | 3,0 |
| Finnland | 2,4 | 3,6 | 2,1 | 3,7 | 2,8 |
| Noreg | 1,4 | 3,8 | 3,7 | 3,0 | 2,2 |
| Ísland | 3,0 | 8,2 | 5,5 | 4,8 | 1,8 |
| Danmørk | 0,7 | 1,7 | 3,4 | 2,6 | 1,9 |

Kelda: Norðurlandaráðið og ES-nevndin.

**Talva 3.2: Arbeiðsloysið og inflasjón í %**

| | Arbeiðsloysið | | | Inflasjón | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2005** | **2006** | **2007** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Svøríki | 6,0 | 4,9 | 4,5 | 0,5 | 1,4 | 2,2 |
| Finnland | 8,4 | 7,8 | 7,7 | 0,9 | 1,3 | 1,4 |
| Fastlands-Noreg | 4,6 | 3,8 | 3,8 | 1,6 | 2,3 | 2,6 |
| Ísland | 2,1 | 1,6 | 2,2 | 4,0 | 5,9 | 3,5 |
| Danmørk | 5,5 | 4,5 | 4,3 | 1,8 | 2,0 | 1,8 |

Kelda: Norðurlandaráðið.

[6] Almenna busketti er land, kommunur og aðrir almennir kassar.

**Talva 3.3: Gjaldsjavni og buskettavlop í % av BTÚ**

| | Gjaldsjavni | | | Alment buskettavlop | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2005** | **2006** | **2007** | **2005** | **2006** | **2007** |
| Svøríki | 6,1 | 6,5 | 7,1 | 0,5 | 0,5 | 0,1 |
| Finnland | 2,4 | 3,0 | 2,0 | 2,4 | 2,5 | 2,5 |
| Fastlands-Noreg | 16,8 | 16,9 | 23,1 | 15,9 | 18,4 | 18,5 |
| Ísland | -16,5 | -14,4 | -7,7 | 3,2 | 1,8 | -1,5 |
| Danmørk | 2,9 | 2,3 | 2,5 | 4,0 | 2,8 | 2,9 |

Kelda: Norðurlandaráðið.

Stórur vøkstur er í **svenska** búskapinum. Lág renta og minkandi arbeiðsloysi stimbrar privatu nýtsluna samstundis sum vøksturin í altjóða búskapinum stimbrar útflutningsvinnurnar. Hækkandi rentan virkar tálmandi á nýtsluna og tí verður mett, at vøksturin verður nakað minni í 2007. Framleidnisvøkstur,[7] kapping í småhandilsliðnum og lág innflutningsinflasjón hevur hildið svenska prísvøkstrinum niðri, men vøksturin í búskapinum sær nú út til at skapa lønar- og prísvøkstur. Avlop er á gjaldsjavna og almenna buskettinum. Svenskarar hava sum mál, at miðal avlopið á almenna buskettinum skal verða 2% av BTÚ yvir tíð.

Í 2005 var vøksturin í **danska** búskapinum tann største í ellivu ár og arbeiðsloysið er tað lægsta seinastu 30 árini. Lága rentan og vøksturin í húsaprísunum hevur økt um privata eftirspurningin samstundis sum vøksturin í altjóða búskapinum hevur stimbrað útflutningsvinnurnar. Herumframt hevur reallønarvøksturin av skattalættanum í 2004 økt enn meira um privata eftirspurningin í Danmørk. Inflasjónin er rímilig og gjaldsjavnaavlopið er stórt, hóast vøksturin í eftirspurninginum hevur økt nógv um innflutningin. Danir hava sum mál, at miðal avlopið á almenna buskettinum skal liggja ímillum 0,5 – 1,5% av BTÚ fram til 2010.

Í **Noreg** er búskaparliga virksemið stórt. Lág renta og stórur vøkstur í oljuíløgunum stimbra innlendska eftirspurningin. Bíleggingarbøkurnar í framleiðslu- og byggivinnuni eru tjúkkar og virksemið er tí stórt, men manglandi arbeiðsmegi er ein avmarking fyri, at stóri vøksturin heldur fram í 2007. Høgu oljuprísirnir geva Noreg stórt avlop á gjaldsjavnanum. Avlopið á almenna buskettinum er eisini

[7] Framleidnisvøkstur er produktivitetsvøkstur.

risastórt. Í Noreg er ein sokallað virkisætlan, har málið við fíggjarpolitikkinum er, at realavkastið av fíggjaríløgunun hjá oljugrunninum, sum í løtuin er 4%, verða slúsaðar inn í stórtingsfíggjarlógina.

**Finski** búskapurin hevur verið merktur av arbeiðsósemjum og tí minkaði vøksturin í 2005, men í ár fer vaksandi innlendski eftirspurningurin og vaksandi útflutningurin at stimbra vøksturin. Arbeiðsloysið sær út til at fara at minka nú vøkstur er komin í byggi- og framleiðsluvinnurnar, har eingin vøkstur hevur verið í longri tíð. Strukturarbeiðsloysið saman við fløskuhálsum á bústaðarmarknaðin-um hótta búskaparvøksturin. Væntandi verður avlopið á almenna buskettinum 2,5% av BTÚ frá 2005 til 2007. Málið hjá finsku stjørnini er ein haldgóður almennur búskapur har landsfíggjarlógin javnvigar í 2007.

Í **Íslandi** hevur skjótt vaksandi íløguvirksemi skapt stóran vøkstur í búskapinum. Íløgur í orkuverkætlanir og óvæntaðar broytingar á figgjarmarknaðunum hava eisini stimbra privatu nýtsluni. Vøksturin í innlendska eftirspurninginum er nú minkaður, meðan útflutningurin av aluminium er nógv vaksin. Arbeiðsloysið er lítið og nógva ferðin á íslendska búskapinum trýstir brúkaraprísirnir upp og tí hevur íslendski miðbankin hækkað stýringsrentuna munandi. Órógvin á fíggjarmarknaðunum og niðurskrivingin av íslendsku krónuni skumpa enn meira undir prísvøksturin. Inflasjónin er høg, men verður væntandi væl lægri í 2007. Sama gongdin er væntandi fyri gjaldsjavnan og í 2007 verður væntandi hall á almenna buskettinum. Málið við fíggjarpolitikkinum er at virka fyri einum støðugum búskapi. Hetta verður gjørt við at minka um innlendska eftirspurningin, tá ið íløguvirksemi í orkuverkætlanirnar eru í hæddini og síðani stimbra virksemi, tá ið hetta íløguvirksemi er liðugt.

## 3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin

Stóri vøksturin í altjóða búskapinum verður væntandi nakað minni næsta ár enn hann hevur verið tey seinastu árini. Vaksandi búskaparligi ójavnin millum stóru búskapirnar í heiminum kann verða ein hóttan ímóti búskaparvøkstrinum, um t.d. fíggjarligir íleggjarar missa álitið á amerikanska búskapin.

Í ES heldur evropeiski miðbankin, ECB, vakið eyga við inflasjónini, sum í løtuni er hægri enn tey 2% p.a., ið miðbankin hevur sett sær sum hámark fyri inflasjónina. Fleiri rentuhækkingar eru tí væntandi.

Í Norðurlondum er vøksturin nakað hægri enn í Evrulondunum, men her er manglandi arbeiðsmegi ein forðing afturat fyri framhaldandi vøkstri. Vøksturin í Norðurlondum verður tí mettur at fara at verða nakað minni í 2007 enn í 2006.

Annars kann gongdin í oljuprísinum verða rættiliga avgerandi fyri gongdina í altjóða búskapinum í 2007.

# 4. FØROYSKI BÚSKAPURIN

Føroyski búskapurin er lítil opin búskapur við stórum samhandli við útheimin. Heimamarknaðurin er lítil og samhandilin við útheimin er sera asymmetriskur. Føroyingar flyta inn næstan allar nýtsluvørur og størsti parturin av útflutninginum er fiskur og fiskaúrdráttir. Tað eru tí rættiliga ymisk viðurskifti, sum ávirka samhandilin við útheimin og samlaðu konjunkturgongdina í Føroyum.

## 4.1 Gongdin í samlaða virkseminum

Búskaparliga gongdin verður vanliga lýst við at vísa gongdina í bruttotjóðar-úrtøkuni, BTÚ, men av tí at føroyska bruttotjóðarúrtøkan ikki er gjørd upp í føstum prísum og leypandi uppgerðin heldur ikki er dagførd, er gongdin í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni ikki serliga nýtiligt mát til at vísa gongdina í búskapinum.

Tað finnast harafturímóti sera góðar og dagførdar skrásetingar av lønarút-gjaldingunum í Føroyum. Lønarútgjaldingarnar svara til yvir helmingin av BTÚ, og gongdin í lønarútgjaldingunum umvegis a-skattaskipanina geva tí eina góða ábending um gongdina í virkseminum í føroyska búskapinum.

Síðstu mánaðirnar í fjør kom rættilig ferð á føroyska búskapin og nógv virksemi er í føroyska búskapinum í løtuni. Fyrstu 8 mánaðirnar í ár var vøksturin í lønarútgjaldingunum umvegis a-skattaskipanina 6,6% samanborið við somu tíð í fjør, sí talvu 4.1 og mynd 4.1. Lønarvøksturin er nú á sama støði sum hann var síðst í 1990-árunum, men nakað minni enn fyrstu árini í hesi øldini.

**Talva 4.1: Vøkstur í lønarútgjaldingum, januar-august**

| *Vøkstur í %* | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøkstur í lønarútgjaldingum | 6,8 | 10,1 | 12,2 | 6,3 | 0,9 | 3,1 | 2,1 | 6,6 |

**Mynd 4.1: Lønarútgjaldingar umvegis a-skattaskipanina, 1996-2006**




Tað er tó stórur munur á gongdini í lønarútgjaldingunum í ymisku vinnugreinunum, sí talvu 4.2.

**Talva 4.2: Lønargjaldingar skiftar á vinnugrein, 2001-2005**

| *Mió. kr.* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður | 6,3 | 6,5 | 6,5 | 7,3 | 8,0 |
| Fiskiskapur | 955,9 | 1.009,2 | 874,2 | 777,1 | 834,4 |
| Ali- og kryvjivirki | 158,6 | 160,4 | 128,7 | 91,6 | 60,0 |
| Ráevnisvinna | 71,1 | 37,9 | 34,1 | 21,6 | 24,9 |
| Fiskavøruídnaður | 372,5 | 412,5 | 410,7 | 396,3 | 380,2 |
| Skipasmiðjur og smiðjur | 123,6 | 130,1 | 130,9 | 127,7 | 130,2 |
| Ídnaður annars | 199,4 | 217,7 | 222,6 | 217,1 | 223,4 |
| Bygging | 302,8 | 345,7 | 348,4 | 385,0 | 379,2 |
| Orkuveiting | 43,0 | 46,7 | 46,3 | 50,3 | 47,2 |
| Handil og umvæling | 505,4 | 568,1 | 588,3 | 594,8 | 585,1 |
| Gistihús og matstovur | 55,4 | 62,6 | 70,2 | 65,4 | 69,7 |
| Sjóflutningur | 211,8 | 255,7 | 257,1 | 260,9 | 285,5 |
| Flutningur annars | 123,5 | 143,5 | 138,2 | 143,0 | 157,6 |
| Postur og fjarskifti | 147,0 | 156,4 | 161,9 | 165,1 | 163,2 |
| Fígging og trygging | 213,4 | 222,8 | 224,9 | 234,2 | 245,1 |
| Vinnuligar tænastur | 148,0 | 159,9 | 178,3 | 192,7 | 206,9 |
| Húshaldstænastur | 31,4 | 36,0 | 36,5 | 40,1 | 42,4 |
| Almenn fyrisiting og tænastur | 1.623,6 | 1.767,9 | 1.868,7 | 2.031,0 | 2.118,6 |
| Felagsskapir og mentan | 102,0 | 102,1 | 147,5 | 118,3 | 128,1 |
| Ótilskilað vinna | 37,6 | 39,3 | 32,7 | 42,6 | 44,8 |
| **Tilsamans** | **5.432,4** | **5.881,3** | **5.906,6** | **5.962,2** | **6.134,6** |

Kelda: Hagstova Føroya

Fyri at lýsa hvønn týdning ymisku vinnurnar hava fyri búskaparligu gongdina, kunnu vinnugreinarnar býtast upp í 4 høvuðsbólkar, sum eru tilfeingisvinna, vinnur innan vøruframleiðslu, privatar tænastur og almennar tænastur.

*Tilfeingisvinna* er landbúnaður, fiskiskapur, ali- og kryvjivirki og ráevnisvinna. *Vinnur innan vøruframleiðslu* eru fiskavøruídnaður, skipasmiðjur, aðrar smiðjur, ídnaður annars, byggivinna og orkuveiting. *Privatar tænastuvinnur* eru handil og umvæling, gistingarhús og matstovur, sjóflutningur og flutningur annars, postur og fjarskifti, fígging og trygging, vinnuligar tænastur, húshaldstænastur, felagskapir og mentan og ótilskilað vinna. *Almennar tænastur* er almenn fyrisiting, allar almennar tænastur og alt annað virksemi, sum tað almenna fíggjar við sínum lønarúteiðslum.

Almennar og privatar tænastur eru vorðnar ein størri partur av føroyska búskapinum seinastu árini, sí talvu 4.3. Í 2001 vóru tær 58,9% og í 2005 vóru tær 65,9% av samlaðu lønargjaldingunum. Sama tíðarskeið eru lønargjaldingarnar í tilfeingisvinnunum minkaðar nógv. Í 2001 vóru tær 21,9% og í 2005 vóru tær 15,1% av samlaðu lønargjaldingunum. Í vøruframleiðsluvinnunum hevur gongdin verið støðug fram til 2004, tá ið lønargjaldingarnar byrja at minka. Í 2001 vóru lønargjaldingarnar í vøruframleiðsluvinnunum 19,2% og í 2004 vóru tær 19,7%, men í 2005 minka tær niður í 18,9% av samlaðu lønargjaldingunum.

**Talva 4.3: Býti av lønargjaldingum á høvuðsbólkar, 2001-2006**

| *%-býti* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** *jan.-jun.* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tilfeingisvinnur | 21,9 | 20,6 | 17,6 | 15,1 | 15,1 | 15,0 |
| Vøruframleiðsla | 19,2 | 19,6 | 19,6 | 19,7 | 18,9 | 18,0 |
| Tænastuvinnur | 29,0 | 29,7 | 31,1 | 31,1 | 31,4 | 32,3 |
| Almennar tænastur | 29,9 | 30,1 | 31,6 | 34,1 | 34,5 | 34,7 |
| Tilsamans | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |

Kelda: Hagstova Føroya

Tænastuvinnurnar verða tí ein lutfalsliga størri partur av føroyska búskapinum, meðan tilfeingis- og framleiðsluvinnurnar minka. Hetta er sama gongdin sum í okkara grannalondum og flestu londunum í vesturheiminum.

## 4.2 Gongdin í privata vinnulívinum

Fyrra hálvár í ár var føroyska veiðan eftir upsa góð 40% hægri enn sama tíðarskeið í fjør, meðan veiðan eftir toski og hýsu minkaði ávíkavist 15% og 5%. Vøksturin í virðinum á veiðini var 20%. Tað hevur verið stórur vøkstur í fiskaprísunum, serliga á upsa, men oljuprísirnir eru eisini vaksnir.

Tað eru serliga trolararnir, ið merkja vaksandi oljuprísin, og hetta sæst aftur við at minni verður avreitt uttanlands. Seinastu árini eru umleið 13 til 18% av toska-, hýsu- og upsaveiðini avreidd uttanlands, men fyrra hálvár í ár vórðu bert 3% av hesum fiskasløgum avreidd uttanlands. Tað fer kortini líka nógvur fiskur óvirkaður av landinum sum árini frammanundan. Umleið 20 til 30% av avreiddu nøgdunum fara óvirkaðar av landinum.

Niðurgongdin í toskafiskiskapinum er eitt úrslit av at toskastovnurin er illa fyri. Fiskirannsóknarstovan metir, at toskastovnurin hevur bert einaferð fyrr verið so illa fyri seinastu 50 árini, sum hann er nú. Hýsustovnurin er heldur ikki væl fyri. Fiskirannsóknarstovan mælti tí í juni í ár landsstýrinum til at skerja fiskidagarnar við 25%, men Løgtingið samtykti at skerja fiskidagatalið við 3% í 2006.

Niðurgongdin í toskafiskiskapinum hevur havt við sær, at stórur vøkstur hevur verið í fiskiskapinum eftir øðrum fiskasløgum. Veiðan av havtasku er t.d. meira enn tvífalda seinastu tvey árini og svarar nú til meira enn 10% av veidda virðinum undir Føroyum.

Niðurgongdin í rækjuprísinum og vøksturin í oljuprísinum hava havt við sær, at rækjuflotin er minkaður úr tíggju skipum niður í trý skip seinastu fimm árini. Uppisjóvarflotin er harafturímóti væl fyri. Umframt góðar prísir er stovnurin av norðhavssild nógv vaksin. Uppisjóvarskipini geva nógv av sær, tí skipini eru nútímansgjørd og vorðin nógv effektivari seinastu árini.

Í fiskivinnuni á landi hevur gingið betur seinasta árið enn tvey tey undanfarnu árini, men samanlagt gevur fiskivinnan á landi framvegis hall. Framgongdin stavar frá hægri upsaprísum og meira innflutningi av fiski til tilvirkingar.

Alivinnan er so smátt við at koma fyri seg aftur. Alivinnan er nú skipað í størri eindir, og vaksandi prísir saman við fleiri sjúkufyribyrgjandi tiltøkum geva góðar vónir um framtíðarútlitini hjá alivinnuni. Í 2004 svaraði útsetingin av smolti til 15% av útsetingini í 2002. Í 2005 vaks útsetingin til 25% og í 2006 verður hon væntandi 45% av útsetingini í 2002. Útflutningurin av alifiski var umleið 75% minni fyrra hálvár í ár samanborið við somu tíð í fjør, men prísurin var umleið 50% hægri.

Hóast útsetingin av alifiski er nógv vaksin, so fer at ganga ein tíð enn, áðrenn fiskurin verður nóg stórur at taka. Stórur partur av framleiðsluni í 2007 verður tí til goymsluíløgur og ikki til útflutning.

Í byggivinnuni er stórt virksemið og bíleggingarbøkurnar hjá byggimeistarum og handverkarum eru fullar langt fram í tíðina. Virksemið í byggivinnuni verður tí ikki minni í 2007 enn tað er nú.

Handils- og tænastuvinnan hevur havt stóra framgongd seinasta árið, serliga er sølan av nýggjum bilum og varandi nýtsluvørum nógv vaksin. Handils- og tænastuvinnan hevur góðar vónir um framtíðina, men bilasølurnar vænta ikki, at líka nógvir bilar fara at verða seldir komandi árið sum í ár.

Royndarboringar verða í løtuni gjørdar eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini, men eingi úrslit av royndarboringunum eru almanna kunngjørd enn. Í fjør vórðu loyvi latin til 7 oljusamtøk at royndarbora eftir olju við Føroyar. Loyvini eru galdandi frá 3 til 8 ár, men oljusamtøkini avgera sjálvi, um tey fara at royndarbora ella ikki.

## 4.3 Gongdin í privata húsarhaldinum

Síðan ársskiftið hevur rættiligur brávøkstur verið í privatu nýtsluni í Føroyum. Hetta sæst aftur í avgjaldsinntøkum landskassans, sum væntandi verða omanfyri 20% hægri í ár enn í fjør, sí mynd 4.2. Tað eru serliga meirvirðisgjalds- og skrásetingargjaldsinntøkurnar, sum eru vaksnar nógv.

**Mynd 4.2: Avgjaldsinntøkur landskassans, 1996-2006**




Umframt lønarvøkstur er høvuðsorsøkin til brávøksturin í privatu nýtsluni nýggir og lagaligir fíggingarhættir til bústaðir, sum føroysku peningastovnarnir fóru at bjóða sínum viðskiftafólkum í fjør.

Fyrr fíggjaðu føroyingar bústaðir við vanligum bankalánum yvir 15-20 ár, sum er rættiliga stuttfreistað fígging av fastari ogn. Henda bústaðarfíggingin hevur merkt, at føroyskir bústaðareigarar hava havt lutfalsliga stóra samansparing og lítla nýtslu, meðan teir hava verið í bestu árum.

Í fjør fóru føroysku peningastovnarnir at bjóða væl lagaligari bústaðarfígging. Nú varð møguligt at fáa 30-ára realkreditfelagslán, við 10 ára avdráttarskáa. Aftur-gjaldstíðin á vanligum bústaðarlánum varð longd munandi og herda kappingin millum føroysku peningastovnarnar lækkaði eisini rentuna á vanligum bústaðar-

lánum munandi. Føroysk bústaðarfígging líkist nú fíggingarmynstrinum í okkara grannalondum.

**Mynd 4.2: Gongdin í sethúsaprísunum 2.ársfjórðing, 1986-2006**




Kelda: Føroya Sparikassi.

Nýggju fíggingartilboðini til bústaðir komu samstundis sum sethúsaprísirnir vóru í stórum vøkstri. Síðan 1995 hevur árligi vøksturin í sethúsaprísunum verið stórur. Hetta kemst m.a. av vaksandi realløn, lækkandi rentu og nógv størri eftirspurningi enn útboði, serliga í høvuðsstaðnum. Lagaligu tilboðini um bústaðarfígging hava tí økt sethúsaprísirnar munandi seinasta árið, sí mynd 4.2.

Føroyskir sethúsaeigarar eru tí væl fyri. Lagalig sethúsalán við longri afturgjaldstíð og lágari rentu, samstundis sum sethúsavirðini eru vaksin munandi, hevur økt munandi um nýtslumøguleikarnar hjá sethúsaeigarunum seinasta árið. Hetta er høvuðsorsøkin til brávøksturin í privatu nýtsluni, men hetta er í sær sjálvum ikki skaðiligt fyri búskapin.

Talan er um eina hugburðsbroyting har føroyingar minka um samansparingina í sethúsum og økja um aðra nýtslu, meðan teir eru í bestu árum. Talan er um eina tillaging, sum hevur stóran vøkstur í privatu nýtsluni við sær. Hvussu leingi tillagingin og stóri vøksturin í privatu nýtsluni fer at vara er ilt at siga nakað um.

Tað eru bæði taparar og vinnarar í hesi gongdini. Vinnarar eru fólk við lítlari sethúsaskuld, serliga tilkomin fólk og pensjónistar, ið eru vorðin munandi betur fyri fíggjarliga, tí sethúsavirðini eru vaksin so nógv. Taparar eru ungfólk, ið skulu seta búgv, t.d. stakir forsyrgjarar, sum lítlar og ongar møguleikar hava at seta føtur undir egið borð, serliga í høvuðsstaðnum.

Henda støðan varpar eisini ljós á pensjónssamansparingina í Føroyum. Føroyska siðvenjan hevur verið at leggja alla sína samansparing í skjóta niðurgjalding av húsaskuldini og við dagsins sethúsaprísum er stórur partur av tilkomnu føroyingunum millióningar, men allar hesar samanspardu milliónirnar standa í fastari ogn. Pensjónistar kunnu tí hava trupulleikar við at fáa gerandisdagin at hanga saman sjálvt um teir eiga fasta ogn fyri milliónir.

## 4.4 Gongdin í almenna búskapinum

Hall hevur verið á almenna buskettinum[8] seinastu árini, men í ár verður mett, at javnvág kemur á buskettið, sí talvu 4.4. Tølini skulu takast við fyrivarni, tí kommunurnar hava ongar felags roknskaparreglur ella -skipan og kommunutølini fyri 2005 eru heldur ikki endalig roknskapartøl. Útlutingar- og einskiljingar-inntøkur frá almennum partafeløgum eru heldur ikki tiknar við í inntøkurnar hjá landinum.

Stígur hevur verið í búskapinum seinastu árini og tí er hallið á almenna buskettin-um ikki ørkymlandi. Rættilig gongd er komin í aftur búskaparliga virksemið í ár og tí vaksa inntøkur landskassans munandi soleiðis at hallið á almenna buskettinum verður burtur í ár.

Løgtingið samtykti eina fíggjarlóg fyri 2006, sum ikki skuldi virka tálmandi á búskaparliga virksemi. Samanborið við 2005 hevur fíggjarpolitikkurin í 2006 verið neutralur, tí busketterað hevur verið við nøkulunda sama hallið hesi bæði árini.

**Talva 4.4: Gongdin í almenna búskapinum, 2002-2006**

| *mió. kr.* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur tilsamans** | **4.912** | **4.804** | **4.844** | **4.923** | **5.372** |
| -Landsskattur og avgjøld | 2.972 | 2.860 | 2.840 | 2.897 | 3.222 |
| -Ríkisveiting o.t. | 629 | 632 | 633 | 631 | 635 |
| -Kommunuskattur | 1.085 | 1.099 | 1.117 | 1.086 | 1.172 |
| -ALS | 142 | 68 | 106 | 124 | 127 |
| -AMEG | 61 | 62 | 61 | 96 | 125 |
| -Sjúkrakassar | 74 | 83 | 87 | 89 | 91 |
| | | | | | |
| **Útreiðslur tilsamans** | **4.500** | **4.785** | **5.040** | **5.117** | **5.344** |
| -Rakstur hjá landinum | 3.146 | 3.194 | 3.323 | 3.467 | 3.567 |
| -Rakstur hjá kommununum | 627 | 751 | 783 | 791 | 889 |
| -Løgur hjá landinum | 240 | 262 | 228 | 201 | 258 |
| -Løgur hjá kommununum | 228 | 236 | 343 | 264 | 303 |
| -Rentur hjá landinum | 24 | 90 | 72 | 71 | 7 |
| -Rentur hjá kommununum | 36 | 24 | 16 | 20 | 14 |
| -ALS | 53 | 69 | 110 | 119 | 98 |
| -AMEG | 44 | 46 | 48 | 63 | 82 |
| -Sjúkrakassar | 102 | 113 | 117 | 121 | 126 |
| | | | | | |
| **Úrslit** | **412** | **19** | **-196** | **-194** | **28** |

Kelda: ALS, AMEG, Fíggjarmálaráðið, Innlendismálaráðið, sjúkrakassarnir.

Stórur vøkstur er í kommunalu inntøkunum í 2006. Busketterað verður við einum vøkstri upp á 86 mió. kr., sum svarar til 7,9%. Hetta kemst bæði av, at stór ferð er á búskapinum og at skattaprosentið er hækkað í flestu kommununum, sí talvu 4.5. Lægsta skattaprosentið í landinum er í Kunoyar Kommunu, har tað er 15% og hægsta skattaprosentið er í Sands Kommunu, har tað er 24%.

Í 2006 buskettera kommunurnar við einum vøkstri í rakstrarútreiðslunum upp á 99 mió. kr., sum svarar til 12,4% og einum vøkstri í løguútreiðslunum upp á 39 mió. kr., sum svarar til 14,8%. Ein orsøk til útreiðsluvøksturin hjá kommununum seinastu árini er, at nøkur málsøki eru løgd út til kommunurnar at umsita.

[8] Almenna buskettið er her lýst sum land, kommunur og ymsir sosialir kassar, har inngjaldið er álagt við lóg og útgjaldið fylgir ikki inngjaldinum.

**Talva 4.5: Kommunuskattaprosent**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Allar kommunur í miðal | 19,44 | 19,45 | 19,51 | 19,61 | 20,61 |
| Tórshavn | 18,75 | 18,75 | 18,75 | 18,75 | 19,75 |
| Klaksvík | 20,00 | 20,00 | 20,00 | 20,00 | 20,00 |
| Runavík | 19,95 | 19,95 | 19,95 | 19,95 | 21,50 |
| Tvøroyri | 22,50 | 22,50 | 22,50 | 22,50 | 23,50 |
| Stórar kommunur í miðal | 20,30 | 20,30 | 20,18 | 20,49 | 21,38 |

Kelda: Toll- og skattstova Føroya.

## 4.5 Gongdin í fólkatalinum

Seinastu 20 árini er fólkatalið í Føroyum vaksið við 2.546 fólkum ella 5,6%, men landafrøðiliga býtið er rættiliga ymiskt, sí talvu 4.6. Fólkatalið í stóru oyggjunum, Streymoy og Eysturoy, er nógv vaksið. Í Norðoyggjum hevur eisini verið ein lítil vøkstur. Fólkatalið sunnanfjørðs er harafturímóti nógv minkað hesi 20 árini.

Fyrsta august í ár var fólkatalið komi upp á 48.470, men av tí at august á hvørjum ári er tann stóri fráflytingarmánaðurin, kann roknast við, at fólkatalið kann fara at minka nakað seinni í ár.

**Talva 4.6: Gongdin í fólkatalinum býtt á sýslur, 1986-2006**

| *sýslur* | 1986 | 1990 | 1996 | 2000 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya Sýsla | 5.925 | 6.148 | 5.614 | 5.810 | 5.990 |
| Eysturoya sýsla | 10.082 | 10.533 | 9.349 | 9.995 | 10.741 |
| Streymoya sýsla | 19.134 | 20.549 | 19.167 | 20.531 | 22.160 |
| Vága sýsla | 2.946 | 2.947 | 2.604 | 2.614 | 2.935 |
| Sandoyar sýsla | 1.739 | 1.757 | 1.514 | 1.445 | 1.443 |
| Suðuroyar sýsla | 5.847 | 5.836 | 5.080 | 4.958 | 4.950 |
| Alt landið | 45.673 | 47.770 | 43.328 | 45.353 | 48.219 |

Kelda: Hagstova Føroya

Í august var vøkstur í øllum sýslum uttan Suðuroyar, har fólkatalið minkaði við 7 fólkum. Størsti vøksturin var í høvuðsstaðarøkinum, har Tórshavn, Argir og Hoyvík tilsamans fingu 123 fleiri íbúgvar. Lutfalsliga størsti vøksturin var í Vágum, har fólkatalið vaks við 29 fólkum.

Føroyska aldursbýtið er eisini broytt seinastu 20 árini, sí talvu 4.7. Tað er eitt lítið vet fleiri fólk í tí sokallaða arbeiðsføra aldrinum, t.e. 16-66 ár, men tað eru lutfalsliga færri yngri og lutfalsliga fleiri eldri nú enn fyri 20 árum síðan. Í 1985 vóru 27,3% av fólkinum yngri enn 16 ár, men í ár er hetta talið minkað niður í 24,6%. Í 1985 vóru 9,5% av fólkinum eldri enn 66 ár, men hetta talið er í ár vaksið til 11,9%.

**Talva 4.7: Gongdin í fólkatalinum býtt á aldursbólkar, 1985-2006**

| *aldursbólkar* | **1985** | **í %** | **2006** | **í %** |
|---|---|---|---|---|
| 0-6 ár | 5.162 | 11,4 | 4.953 | 10,3 |
| 7-15 ár | 7.226 | 15,9 | 6.889 | 14,3 |
| 16-66 ár | 28.623 | 63,2 | 30.636 | 63,5 |
| 67 ár og eldri | 4.307 | 9,5 | 5.741 | 11,9 |
| Tilsamans | 45.318 | 100,0 | 48.219 | 100,0 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 4.6 Gongdin í arbeiðsloysinum

Í juli varð árstíðarjavnaða arbeiðsloysið 2,8%. Arbeiðsloysið hevur tí verið niðan fyri 3% størsta partin av árinum í ár. Hetta er sera lítið arbeiðsloysið samanborið við onnur lond, tó at tað ikki er metlágt sum í tíðarskeiðnum januar 2002 til september 2003, tá arbeiðsloysið var 2,5% ella lægri, sí talvu 4.8.

**Talva 4.8 Gongdin í arbeiðsloysinum, 2001-2005**

| | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skrásettum | 876 | 679 | 750 | 1.105 | 1.212 |
| Tal av fulltíðararbeiðsleysum | 770 | 596 | 664 | 960 | 1.051 |
| Arbeiðsfjøld | 25.058 | 25.939 | 26.617 | 27.128 | 27.466 |
| Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld | 3,1 | 2,3 | 2,5 | 3,5 | 3,8 |
| Árstíðarjavnað arbeiðsloysis-% | 3,1 | 2,3 | 2,5 | 3,6 | 3,8 |

Kelda: Hagstova Føroya

Arbeiðsloysið í øllum Føroyum er lægri enn 3%, og tað er tað eisini í flestu sýslunum, uttan Norðoya og Suðuroya sýslum, har tað er munandi hægri. Í Suðuroy er gongdin tó tann, at arbeiðsloysið er minkað hvønn mánað síðan februar 2005 og er nú komið niður á 3,6%. Í Norðoyggjum er øvugt. Har er

arbeiðsloysið vaksið seinastu 4 mánaðirnar og er nú komið upp á 4,5%. Seinasta árið er arbeiðsfjøldin í øllum Føroyum vaksin 1%.

Arbeiðsloysið er størst hjá fólki millum 55 og 66 ár og konufólk hava størri arbeiðsloysið í øllum aldursbólkunum, serliga í aldursbólkinum 25-34 ár er arbeiðsloysið munandi størri hjá konufólki.

Vinnusamansetingin er eisini broytt. Tænastuvinnurnar vaksa, meðan tilfeingis- og framleiðsluvinnurnar minka. Í mai í ár vóru 4% fleiri í privatu tænastuvinnunum og 4% færri vóru í tilfeingisvinnunum. Harufturat vóru 1% fleiri innan almenna tænastu og 1% færri í vøruframleiðandi vinnunum.

## 4.7 Gongdin í brúkaraprístalinum

Annan ársfjórðing í ár var vøksturin í brúkaraprístalinum 2,3% samanborið við sama ársfjórðing í fjør, sí talvu 4.9. Hetta er væl størri prísvøkstur enn 1. ársfjórðing, tá prísirnir vóru 0,9% hægri enn 1. ársfjórðing 2005.

**Talva 4.9: Gongdin í brúkaraprístalinum, 2002-2006**

| *2. ársfjórðingur* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Brúkaraprístalið** | **100,5** | **102,0** | **102,2** | **103,9** | **106,2** |
| -Matur og drekka | 103,4 | 103,5 | 104,0 | 104,8 | 107,7 |
| -Rúsdrekka og tubbak | 100,2 | 101,0 | 101,6 | 110,4 | 114,3 |
| -Klædnavørur og fótbúnaður | 101,4 | 99,9 | 98,0 | 92,5 | 93,6 |
| -Býli | 93,8 | 95,1 | 93,9 | 98,0 | 101,8 |
| -Húsbúnaður, húsarhaldstól o.l. | 102,3 | 102,4 | 102,2 | 101,2 | 99,6 |
| -Heilsa | 102,4 | 108,4 | 112,0 | 112,9 | 112,9 |
| -Flutningur | 99,9 | 105,4 | 107,6 | 110,8 | 116,0 |
| -Samskifti | 92,8 | 91,0 | 87,1 | 87,6 | 89,0 |
| -Frítíð og mentan | 105,7 | 107,9 | 107,5 | 107,1 | 105,3 |
| -Útbúgving | 104,1 | 100,3 | 94,8 | 101,2 | 101,2 |
| -Hotel og matveitarar | 106,4 | 108,1 | 111,5 | 113,0 | 115,2 |
| -Ymiskar vørur og tænastur | 103,7 | 105,5 | 107,2 | 108,7 | 111,0 |

Kelda: Hagstova Føroya

Árligi prísvøksturin hevur verið størstur í høvuðsbólkunum flutningur 4,7%, býli 3,8%, rúsdrekka og tubbak 3,5% og matur og drekka 2,8%, meðan príslækkingin

hevur verið mest í høvuðsbólkunum frítíð og mentan -1,6% og innbúgv, húsbúnaður o.l. -1,5%.

Teir nýtslubólkar, sum hava ávirkað brúkaraprístalið mest uppeftir seinasta árið eru brenniolja til húsarhald 1,14 prosentstig, brennievni til akfør 0,53 prosentstig, tubbakk 0,23 prosentstig og kjøt 0,24 prosentstig, meðan undirbólkarnir rentuútreiðslur fyri íbúðalán -0,67 prosentstig og frítíðarferð uttanlands -0,22 prosentstig, hava ávirkað brúkararprístalið mest niðureftir.

Frá 1. til 2. ársfjórðing í ár hækkaði brúkaraprístalið 1,6%, úr 104,5 upp í 106,2. Tað eru serliga størri býlisútreiðslur og hægri prísir á brennievni og matvørum, sum toga brúkaraprístalið uppeftir. Prísvøksturin í nýtslubólkinum býli hevur í miðal verið 4,5%. Rentan á íbúðalánum er hækkað 6,4% og hevur hetta ávirkað brúkaraprístalið 0,31 prosentstig uppeftir. Prísurin á brenniolju til húsarhald er hækkaður 8,3%, svarandi til 0,47 prosentstig. Húsaleiga er farin 2,0% upp, svarandi til 0,05 prosentstig og prísirnir fyri viðlíkahald á bústaði eru hækkaðir 2,1%, svarandi til 0,06 prosentstig. Prísurin á brennievni til akfør er hækkaður 7,3%, svarandi til 0,24 prosentstig. Prísirnir á mati og drekka eru farnir 1,1% upp seinasta ársfjórðingin og hevur hesin prísvøksturin ávirkað brúkaraprístalið 0,24 prosentstig uppeftir.

## 4.8 Gongdin í fíggjar sektorinum

Fyrra hálvár í ár var vøksturin í útlánum hjá føroysku peningastovnunum næstan 20%. Stóri vøksturin kemur eftir nøkur ár við lítlum vøkstri ella afturgongd. Orsøkin til vøksturin er økta búskaparliga virksemi, vaksandi húsaprísir og at peningastovnarnar hava fíggjað fleiri størri handlar í vinnulívinum.

Samlaða avlopið hjá føroysku peningastovnunum vaks úr góðum 250 mió. kr. í 2004 upp í 340 mió. kr. í 2005, sí talvu 4.10. Høvuðsorsøkin er at í 2004 høvdu peningastovnarnir stór tap og stórar burturleggingar til lán í alivinnuni. Inntøkurnar av rentum og ómaksgjøldum var næstan óbroytt hesi bæði árini. Samlaða avlopið fyrra hálvár í ár hevur eisini verið stórt.

**Talva 4.10: Samlað úrslit hjá føroysku peningastovnunum, 2003-2006**

| *Mió. kr.* | **2003** | **2004** | **2005** | **1. hálvár 2006** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur av rentum og ómaksgjøldum | 574 | 553 | 550 | 299 |
| Kursbroytingar | 16 | 86 | 47 | -24 |
| Úrslit av fíggjarligum postum | 616 | 648 | 597 | 275 |
| Rakstrarútreiðslur | 281 | 290 | 313 | 168 |
| Tap og burturleggingar, netto | 437 | 119 | -15 | -15 |
| Úrslit hjá dóttirfeløgum o.a. | 1 | 13 | 41 | 66 |
| Úrslit áðrenn skatt | -100 | 252 | 341 | 187 |
| Solvensprosent | 30,9 | 31,4 | 21,5 | - |

Kelda: Roknskapirnir hjá føroysku peningastovnunum.

Orsøkin til at solvensprosentið er so nógv minkað í 2005 er at Føroya Banki rindaði 600 mió. kr. í vinningsbýti til Fíggingargrunnin frá 1992. Hetta svarar til 1/3 av eginpeninginum. Hetta varð gjørt fyri at tillaga kapitalbygnaðin í bankanum, sum ein liður í fyrireikingunum til at einskilja bankan. Solvensprosentið í Føroya Banka er nú 28%.

Kappingin millum føroysku peningastovnarnar er nógv herd seinastu árini. Hetta sæst m.a. við at peningastovnarnir hava fingið sær deildir í lokaløkinum hjá hvørjum øðrum, at rentan er nógv lækkað og at útboðið av ymiskum lánum til bústaðarfígging er nógv vaksin. Umframt hetta eru íslendskir fíggingarstovnar farnir at gera vart við seg í føroyska vinnulívinum.

## 4.9 Gongdin á handilsjavna og uttanlandsskuld

Frá 2001 til 2005 minkaði føroyska útflutningsvirðið við 724 mió. kr. ella 16,9%, sí talvu 4.11. Føroyski innflutningurin var eitt sindur hægri í 2005 enn hann var í 2001. Verða skip og flogfør tikin burturúr, so er innflutningurin minkaður við 446 mió. kr. ella 11,3% frá 2001 til 2005. Sama tíðarskeið er innflutningurin av olju vaksin 227 mió. kr., sum svarar til 46%.

**Talva 4.11: Út- og innflutningur skiftur á høvuðsbólkar, 2001-2005**

| *Mió. kr.* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur:** | | | | | |
| -Køldur fiskur | 1.404 | 1.477 | 1.288 | 1.185 | 1.026 |
| -Frystur fiskur | 1.638 | 1.580 | 1.368 | 1.194 | 1.334 |
| -Saltaður fiskur | 678 | 653 | 642 | 541 | 512 |
| -Royktur fiskur | 67 | 29 | 14 | 29 | 41 |
| -Turkaður fiskur | 222 | 220 | 238 | 364 | 350 |
| -Tilgjørdur niðursjóðaður fiskur | 125 | 127 | 109 | 83 | 54 |
| -Fiskur, onnur haldbúning | 74 | 74 | 104 | 81 | 50 |
| -Aðrar fiskavørur | 15 | 1 | 0 | 1 | 1 |
| -Skip | 58 | 61 | 139 | 189 | 195 |
| -Aðrar vørur | 28 | 12 | 9 | 23 | 25 |
| **Útflutningur tilsamans** | **4.310** | **4.234** | **3.912** | **3.689** | **3.586** |
| **Innflutningur:** | | | | | |
| -Til hav- og landbúnað | 368 | 276 | 297 | 220 | 102 |
| -Til byggivirki | 343 | 383 | 357 | 366 | 365 |
| -Til aðra framleiðslu | 769 | 790 | 757 | 689 | 639 |
| -Brennievni o.t. | 489 | 415 | 446 | 531 | 716 |
| -Maskinur og onnur útgerð | 622 | 441 | 475 | 367 | 304 |
| -Bilar og onnur flutningsfør | 250 | 260 | 229 | 208 | 221 |
| -Til beinleiðis nýtslu | 978 | 1.049 | 1.067 | 1.083 | 1.060 |
| -Skip, flogfør og tílíkt | 223 | 178 | 1.154 | 179 | 776 |
| -Rávøra til fiskavirking | 117 | 103 | 85 | 96 | 84 |
| **Innflutningur tilsamans** | **4.159** | **3.897** | **4.865** | **3.739** | **4.266** |
| **Handilsjavni** | **151** | **337** | **-953** | **-50** | **-680** |

Kelda: Hagstova Føroya.

Fyrstu 7 mánaðirnar í ár hevur útflutningurin verið nakað minni enn somu tíð í fjør, meðan innflutningurin hevur verið væl størri, sí talvu 4.12.

Útflutningurin var samanlagt 2.026 mia. kr., sum er 43 mió. kr. minni enn somu 7 mánaðirnar í fjør. Av øðrum vørum enn fiski og skipum varð útflutningurin meira enn fimm ferðir so nógv sum somu tíð í fjør, men hetta kemst av tí, at í ár er fyrsta árið, har aðrar vørur enn fiskur regluliga verða skrásettar í útflutningstølunum.

**Talva 4.12: Út- og innflutningur skiftur á høvuðsbólkar, 2005-2006**

| *Mió. kr.* | **2005** jan-jul | **2006** jan-jul | **Munur** | **í %** |
|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur:** | | | | |
| -Køldur fiskur | 571 | 475 | -96 | -17 |
| -Frystur fiskur | 783 | 807 | -24 | 3 |
| -Saltaður fiskur | 265 | 277 | 12 | 5 |
| -Royktur fiskur | 23 | 26 | 3 | 13 |
| -Turkaður fiskur | 251 | 299 | 48 | 19 |
| -Tilgjørdur niðursjóðaður fiskur | 32 | 24 | -8 | -26 |
| -Fiskur, onnur haldbúning | 30 | 31 | 1 | 5 |
| -Aðrar fiskavørur | 1 | 1 | 0 | 0 |
| -Skip | 99 | 2 | 97 | -98 |
| -Aðrar vørur | 16 | 86 | 70 | 451 |
| **Útflutningur tilsamans** | **2.069** | **2.026** | **-43** | **-2** |
| **Innflutningur:** | | | | |
| -Til hav- og landbúnað | 63 | 59 | -4 | -7 |
| -Til byggivirki | 198 | 235 | 37 | 19 |
| -Til aðra framleiðslu | 389 | 408 | 19 | 5 |
| -Brennievni o.t. | 430 | 568 | 138 | 32 |
| -Maskinur og onnur útgerð | 177 | 205 | 28 | 16 |
| -Bilar og onnur flutningsfør | 134 | 194 | 61 | 45 |
| -Til beinleiðis nýtslu | 598 | 637 | 39 | 7 |
| -Skip, flogfør og tílíkt | 19 | 17 | -2 | -12 |
| -Rávøra til fiskavirking | 50 | 75 | 25 | 51 |
| **Innflutningur tilsamans** | **2.059** | **2.399** | **340** | **17** |

Kelda: Hagstova Føroya.

Av fiskavørum er útflutt fyri umleið somu upphæddir sum í fjør, umleið 1,9 mia. kr., men samansetingin av fiskavørunum er kortini ikki heilt tann sama sum undanfarnu árini. Minni hevur verið útflutt av laksi, sílum, rækjum og toski. Harafturímóti varð meira útflutt av upsa, fiskamjøli, svartkjafti, havtasku, brosmu og longu. Útflutningurin av fiskavørum var eina hálva milliard krónur minni fyrstu sjey mánaðirnar í ár enn somu tíð besta árið í hesi øldini, sum var í 2001.

Talan er bæði um eitt rímiliga stórt fall í fiskaprísunum, men eisini um ringan toskafiskiskap, kreppu í alivinnuni og burturfjarandi rækjufiskiskap. Hóast upsafiskiskapurin hevur verið av tí allarbesta, ger tað lítlan mun ímóti missinum, tí at upsi er bíligari vøra enn toskur, laksur og rækjur.

Tað var framvegis stórur vøkstur í innflutninginum av brennievni fyrstu 7 mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør og innflutningurin av bilum fer at seta met í ár.

Fyrra hálvár í ár vóru fluttir inn 1.156 persónbilar ímóti 878 fyrra hálvár í fjør. Hetta er nærum ein triðingur fleiri enn í fjør og mesta talið nakrantíð.

Verður innflutningurin av bilum restina av árinum, sum hann hevur verið higartil, fer at vera innflutt fyri meira enn 200 mió. kr. av persónbilum, sum fer at svara til meira enn 1.900 bilar. Seinastu árini hevur verið innflutt fyri umleið 150 mió. kr. av persónbilum og bara tríggjar ferðir hevur bilainnflutningurin verið oman fyri 150 mió. kr. Tað var í 2001, 2002 og 2005.

Innflutningurin verður eisini hægri av øðrum drúgvum nýtsluvørum í ár enn árini frammanundan. Innflutningurin av sjónvarpsmóttakarum er nærum tvífalt so stórur í ár sum í fjør, men sjónvarpstólini eru eftir øllum at døma dýrari, tí vøksturin í innfluttu nøgdini er væl minni. Hetta kemst uttan iva av, at í fjør vórðu punktgjøldini tikin av sjónvarpstólum, útvarpstólum og øðrum elektroniskum vørum.

Uttanlandshandilin er sostatt merktur av, at innflutningurin veksur av oljuprís-vøkstri og annars góðum keypihugi, meðan útflutningurin er darvaður av lítlari aliframleiðslu og misjøvnum inntøkum frá fiskaútflutninginum annars.

Til innflutningstølini skal viðmerkjast, at Hagstovan fyri stuttari tíð síðan kunnaði landsstýrismannin um, at innflutningstølini fyri 2005 og 2006 verða nakað størri enn tey tølini, sum í løtuni eru tøk. Hagstovan endurskoðar í løtuni tølini.

Í 2003 og 2004 áttu føroyingar uml. 3,4 mia. kr. í nettoáogn uttanlands, sí talvu 4.13. Nettoáognin er býtt soleiðis, at tað almenna skyldar umleið 3 mia. kr., men

eigur meira enn 2 mia. kr. (peningaligir myndugleikar). Peningastovnar og aðrir privatir geirar eiga meira enn 2 mia. kr. hvør tilgóðar uttanlands.

**Talva 4.13: Nettoskuld uttanlands, 2004 og 2005**

| *Mia. kr.* | **2004** | **2005** |
|---|---|---|
| Tað almenna | 3.052 | 2.956 |
| Peningaligir myndugleikar | -2.275 | -2.028 |
| Peningastovnar | -2.094 | -2.213 |
| Aðrir geirar | -2.102 | -2.087 |
| Nettoskuld | -3.419 | -3.373 |

Kelda: Hagstova Føroya.

## 4.10 Framtíðarútlitini fyri føroyska búskapin

Stór framgongd er í føroyska búskapinum og hon fer at halda fram eina tíð enn. Hetta er m.a. grundað á stórari framgongd í byggivinnuni og at alivinnan er við at fóta sær aftur. Bíleggingarbøkurnar hjá byggimeistarum og handverkarum eru fullar langt fram í tíðina og stóru hallini hjá alivinnuni eru nú vend til avlop.

Føroyski búskapurin er sunnur og tí er vøksturin væl grundaður, men tað eru ymisk viðurskifti, sum kunnu tálma vøksturin. Stóra trýstið á toskastovnarnar kann gera toskafiskiskapin enn lakari. Tað er eisini torført at siga nakað um útlitini fyri fiskaprísum, oljuprísi og rentuni.

Tað er enn ov tíðliga at siga nakað um møguleikarnar fyri at finna olju og gass í føroysku undirgrundini, men royndarboringar verða í løtuni framdar í sambandi við 2. útbjóðingarumfar. Tað fer sjálvandi at hava stóra ávirkan á metingarnar fyri føroyska búskapin um olja og gass verður funnið í rakstrarverdum nøgdum.

# 5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2007

## 5.1 Búskaparpolitikkurin 2007

Í samgonguskjalinum er ásett, at fíggjarpolitikkurin skal lagast eftir búskaparligu fortreytunum í landinum og at avlop skal fáast aftur á fíggjarlógina. Eitt av høvuðsmálunum verður tí at hava avlop á fíggjarlógaruppskotinum 2007.

Árini frammanundan hava búskaparligu fortreytirnar verið øðrvísi og tí hevur verið busketterað við halli á fíggjarlógaruppskotunum seinnu árini, men í 2006 kom brádlig vend í búskapargongdina og nú er rættilig ferð á føroyska búskapinum.

Ekspansivi og arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkurin seinnu árini hevur tænt sínum endamáli, men verður nú lagdur um, soleiðis at hann ikki virkar ov stimbrandi á búskaparliga virksemið.

Virksemið er stórt, og tørvur er á arbeiðsmegi, serliga innan byggivinnuna. Tað hevur tí týdning fyri fíggjarpolitikkin, sum nú skal rekast, at landið ikki økir sínar útreiðslur ov nógv og stimbrar búskaparliga virksemið, soleiðis at føroyski búskapurin verður ovhitaður.

## 5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2007

RLÚ-avlop landskassans verður 74,5 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007, sí mynd 5.1. Hetta er væl størri enn úrslitið í ár, sum eisini verður mett til avlop. Her eru inntøkur frá einskiljingum av fyritøkum hjá landinum ikki tiknar við.

Politisk semja er um, at einskiljingarinntøkur ikki skulu takast við í dagliga raksturin og vanliga RLÚ-úrslit landskassans. Einskiljingarinntøkur verða skrásettar sum serinntøkur á fíggjarlóg og í landsroknskapi. Í 2006 verða serinntøkurnar frá einskiljingum mettar til góðar 650 mió. kr. og í 2007 verða tær umleið 400 mió. kr. tá mett verður út frá innara virðinum á Føroya Banka. Hetta svarar til ein triðing av innara virðinum í Føroya Banka.

**Mynd 5.1: RLÚ-úrslit landskassans, 2002-2007**




Viðm: Tølini fyri 2006 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2007 eru úr fíggjarlógaruppskotinum. Tølini eru uttan einskiljingarinntøkur.

Talva 5.1 vísír vøksturin í inntøkum og útreiðslum landskassans frá 2002 til 2007.

**Talva 5.1: Vøkstur í inntøkum og útreiðslum landskassans, 2002-2007**

| *Vøkstur í %* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | -5,2 | -0,9 | -2,7 | 1,6 | 11,3 | 3,2 |
| Útreiðslur | 10,0 | 3,9 | 2,2 | 3,2 | 3,6 | 2,6 |

Viðm: Tølini fyri 2006 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2007 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.3 Gongdin í inntøkum landskassans

Inntøkur landskassans verða bólkaðar í 4 høvuðsbólkar, sí talvu 5.2. Samlaðu inntøkur landskassans vuksu nógv fram til 2001, tá ið tær vóru mestar. Síðan minkaðu tær fram til 2004. Størsta minkingin var í 2002, tá ið heildarveitingin varð skerd 366 mió. kr.

Í 2005 er vøkstur aftur í inntøkunum og í 2006 vaksa tær sera nógv, sjálvt tá serinntøkurnar ikki verða. Mett verður, at vøksturin verður ikki líka stórur í 2007.

Størsti parturin av inntøkum landskassans eru skattainntøkur. Skattainntøkurnar vuksu á hvørjum ári til 2002 og eru síðan minkaðar til 2005. Hetta kemst í høvuðsheitinum av búskaparligari stagnatión og at skattalættar vórðu givnir fyri 52 mió. kr. í 2003, 71 mió. kr. í 2004 og 60 mió. kr. í 2005.

Árligir skattalættar á 60 mió. kr. verða eisini givnir í 2006 og 2007, men nú er rættilig gongd komin í aftur búskapin og tí er eisini stórur vøkstur í skattainntøkum landskassans hesi bæði árini.

Næst størsti parturin av inntøkum landskassans eru avgjaldsinntøkur. Avgjaldsinntøkurnar vuksu nógv fram til 2003, síðan er ein lítil minking í 2004, men í 2005 kom rættilig ferð á vøksturin í avgjaldsinntøkunum. Frá 2004 til 2007 vaksa avgjaldsinntøkurnar við góðum 350 mió. kr. Í 2006 hevur vøksturin verið metstórur, við góðum 20% ella 277 mió. kr. Hetta kemst av búskaparligari framgongd, vaksandi sethúsavirðum og nýggjum fíggingarhættum til sethús, góðum keypihugi og annars jaligum vónum um framtíðina.

Undir ymsum inntøkum er útluting úr partafeløgum, sum landið eigur ella eigur í. Hetta er nógv tann størsti posturin undir ymsum inntøkum. Herafturat koma m.a. ymisk loyvisgjøld til landskassan og bøtur.

**Talva 5.2: Inntøkur landskassans, 2001-2007**

| *Mió. kr.* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.567 | 1.675 | 1.581 | 1.539 | 1.508 | 1.613 | 1.701 |
| Avgjaldsinntøkur | 1.148 | 1.239 | 1.274 | 1.259 | 1.322 | 1.579 | 1.627 |
| Ymsar inntøkur | 90 | 58 | 81 | 41 | 67 | 98 | 88 |
| Heildarveiting o.t. | 995 | 629 | 632 | 633 | 631 | 635 | 635 |
| **Tilsamans** | **3.800** | **3.601** | **3.568** | **3.472** | **3.528** | **3.925** | **4.051** |

Viðm: Tølini fyri 2006 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2007 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Í 2006 fer landskassin at fáa góðar 650 mió. kr. í einskiljingarinntøkum, men hesar inntøkur verða ikki skrásettar undir vanliga rakstrinum hjá landskassanum, og tí eru tær ikki tiknar við í talvu 5.2. Mett verður at landskassin fer at fáa góðar 650 mió. kr. í einskiljingarinntøkum frá Atlantsflog og LÍV og eyka vinningsbýti

frá Føroya Banka í sambandi við at hann verður fyrireikaður til einskiljing. Í 2007 fer landskassin væntandi at fáa umleið 400 mió. kr. í einskiljingarinntøkum. Hesar inntøkur verða skrásettar sum serinntøkur í landskassaroknskapinum uttanfyri vanliga raksturin hjá landskassanum.

## 5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans

Stórur vøkstur var í útreiðslum landskassans fram til 2002. Síðan tá hevur vøksturin verið væl minni, sí talvu 5.3. Nógv tann størsti parturin av útreiðslum landskassans eru rakstrarútreiðslur. Rentuútreiðslurnar eru vorðnar ein minni og minni partur á útreiðslusíðu landskassans.

Í rakstrarútreiðslunum eru lønir og ymiskar flytingar til einstaklingar, t.d. fólkapensjón, nógv tann størsti parturin. Lønirnar umboða umleið tveir triðingar av rakstrarútreiðslunum, og tí hevur gongdin í lønarútreiðslunum alstóran týdning fyri gongdina í rakstrarútreiðslunum. Vøksturin í rakstrarútreiðslunum verður tann sami í 2007 sum í 2006, umleið 3,2%.

**Talva 5.3: Útreiðslur landskassans, 2001-2007**

| *Mió. kr. (netto)* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 2.846 | 3.147 | 3.192 | 3.324 | 3.467 | 3.577 | 3.693 |
| Løguútreiðslur | 180 | 240 | 262 | 228 | 201 | 291 | 261 |
| Rentuútreiðslur | 76 | 24 | 91 | 72 | 71 | 7 | 22 |
| **Tilsamans** | **3.102** | **3.411** | **3.545** | **3.624** | **3.739** | **3.875** | **3.976** |

Viðm: Tølini fyri 2006 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2007 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Talva 5.4 vísir nettorakstrarútreiðslur landskassans býttar á greinar frá 2002 til 2006. Tølini skulu takast við fyrivarni, tí í 2002 og 2003 eru tað tølini fyri løgmál (í 2002 innlendismál) og oljumál, sum eru løgd saman til innlendismál. Í 2003 eru tølini fyri familju- og heilsumál og almannamál løgd saman til almanna- og heilsumál.

**Talva 5.4: Nettorakstrarútreiðslur landskassans, 2003-2007**

| *Mió. kr.* | | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 31,0 | 33,5 | 35,2 | 37,1 | 39,8 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 28,9 | 31,8 | 35,8 | 35,4 | 35,7 |
| § 3 | Fíggjarmál | 198,5 | 199,8 | 208,2 | 228,5 | 227,4 |
| § 5 | Fiskivinna | 149,7 | 165,3 | 167,2 | 172,7 | 167,8 |
| § 6 | Vinnumál | 345,8 | 284,5 | 287,4 | 275,6 | 285,6 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 665,0 | 691,3 | 717,5 | 759,1 | 781,2 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 1.728,9 | 1.809,0 | 1.906,4 | 1.939,9 | 2.004,7 |
| § 15 | Innlendismál | 44,3 | 108,7 | 109,3 | 128,2 | 151,0 |
| **Tilsamans** | | **3.192,1** | **3.323,9** | **3.467,1** | **3.576,5** | **3.693,2** |

Viðm: Tølini fyri 2006 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2007 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Tað skal viðmerkjast, at ein av orsøkunum til lítla vøksturin til almanna- og heilsumál í 2006 er, at barnaverndin varð løgd út til kommunurnar at umsita í 2006. Orsøkin til stóra vøksturin til fíggjarmál er, at FAS-endurgjaldið verður 20 mió. kr. hægri og rentustuðulin verður 5 mió. kr. hægri enn í 2005. Talva 5.5 vísir løgurnar frá 2003 til 2007 býttar á málsøki.

**Talva 5.5: Nettoløguútreiðslur landskassans, 2003-2007**

| *Mió. kr.* | | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 11,6 | 0,8 | 6,4 | 24,5 | 2,0 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 2,1 | 2,5 | 2,5 | 4,0 | 2,0 |
| § 3 | Fíggjarmál | -0,1 | 1,5 | -0,7 | - | 1,0 |
| § 5 | Fiskivinna | 0,4 | 0,0 | 0,6 | 10,5 | 14,0 |
| § 6 | Vinnumál | 166,3 | 89,0 | 80,8 | 142,2 | 129,7 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 14,0 | 6,7 | 14,5 | 39,4 | 75,6 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 67,7 | 61,5 | 65,9 | 69,9 | 36,0 |
| § 15 | Innlendismál | - | 66,0 | 30,8 | - | 1,0 |
| **Tilsamans** | | **261,9** | **228,1** | **200,8** | **290,5** | **261,3** |

Viðm: Tølini fyri 2006 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2007 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.5 Raðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2007

Í talvu 5.6 er stutt yvirlit yvir, hvussu gongdin er í ymsu játtanarsløgunum frá fíggjarlógini 2006 til fíggjarlógaruppskotið 2007 og hvussu broytingarnar eru býttar millum ymsu greinirnar. Nágreiniligar viðmerkingar og grundgevingar fyri

broytingunum eru í viðmerkingunum til einstøku høvuðskonturnar í fíggjarlógaruppskotinum.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 økjast rakstrarútreiðslurnar 102,7 mió. kr., herav eru sáttmálalønarhækkingar upp á góðar 30 mió. kr. Lógarbundnu útreiðslurnar vaksa 39,9 mió. kr. Løguútreiðslurnar vaksa 3,2 mió. kr. Játtanin til landsfyritøkur veksur 34,6 mió. kr. og onnur játtan minkar 467,2 mió. kr., harav vaksa útreiðslurnar 29,5 mió. kr. og inntøkurnar vaksa 496,7 mió. kr.

Farið verður tí frá einum hallið á 212,5 mió. kr. á fíggjarlógini 2006 til eitt avlop á 74,5 mió. kr. á fíggjarlógaruppskotinum 2007. Herafturat koma serinntøkurnar á 400 mió. kr. undir § 53.

**Talva 5.6: Broytingar frá fíggjarlógini 2006 til fíggjarlógaruppskotið 2007**

| § | FL-2006 | Rakstur | Lóg | Løga | Landsf. | Onnur | FLU-2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | -57.091 | -2.666 | -23 | 18.000 | - | - | -41.780 |
| 2 | -37.927 | -760 | - | 1.000 | - | - | -37.687 |
| 3 | -197.580 | -1.826 | -7.980 | -1.000 | - | -20.000 | -228.386 |
| 5 | -178.396 | -6.704 | 8.600 | -3.900 | - | -1.400 | -181.800 |
| 6 | -403.882 | -2.422 | -3.200 | -300 | - | -5.450 | -415.254 |
| 7 | -796.411 | -29.493 | -2.509 | -27.400 | - | -1.031 | -856.844 |
| 8 | -1.965.113 | -50.485 | -34.744 | 11.400 | -526 | -1.246 | -2.040.714 |
| 15 | -108.277 | -8.294 | - | -1.000 | -34.053 | -400 | -152.024 |
| 20 | 3.532.218 | - | - | - | - | 496.749 | 4.028.967 |
| | **-212.459** | **-102.650** | **-39.856** | **-3.200** | **-34.579** | **467.222** | **74.478** |
| 53 | **-** | - | - | - | - | 400.000 | 474.478 |

Niðanfyri eru vístar nakrar broytingar frá fíggjarlógini 2006 til fíggjarlógaruppskotið 2007, sum eru størri enn 1 mió. kr.

**§ 1 Løgtingið:**

Í fíggjarlógaruppskotinum verða rakstrarútreiðslurnar øktar 1,9 mió. kr. Hetta er til KT og nýtt innbúgv til nýggja løgtingshúsið. Løgujáttanin til løgtingshúsið lækkar 18 mió. kr.

**§ 2 Løgmansfyrisitingin:**

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 verða rakstrarútreiðslurnar hjá løgmansfyrisitingini og sendistovum øktar 760 tús. kr. Løgujáttanin til umbygging í Tinganesi minkar 1,0 mió. kr.

**§ 3 Fíggjarmál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum verður øktur 30,3 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

| | | |
|---|---|---|
| -FAS-endurgjald | - | 20,0 mió. kr. |
| -Stuðul til rentuútreiðslur | - | 7,0 mió. kr. |
| -Hagstova Føroya | - | 1,6 mió. kr. |
| -Toll- og skattstova Føroya | - | 1,5 mió. kr. |
| -Flyting av fíggjarstovnum landsins | - | 1,0 mió. kr. |
| -Landsins ognir | + | 1,8 mió. kr. |

**§ 5 Fiskivinna:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður øktur 2,4 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

| | | |
|---|---|---|
| -Effektivar veðhaldsútreiðslur | - | 3,5 mió. kr. |
| -Útgerð til Magnus Heinason | - | 3,0 mió. kr. |
| -Tilbúgvingarsamskipanin | - | 2,2 mió. kr. |
| -Søla av bygningi | - | 2,0 mió. kr. |
| -Trygdarmiðstøðin | - | 2,0 mió. kr. |
| -Hvalagransking og hvalateljing | - | 1,6 mió. kr. |
| -Telefonstuðul | + | 2,0 mió. kr. |
| -Útlán | + | 2,1 mió. kr. |
| -Tilbúgvingarætlan | + | 3,1 mió. kr. |
| -Gjald til rækjuflotan | + | 3,5 mió. kr. |
| -Inntøkutrygd | + | 4,0 mió. kr. |

**§ 6 Vinnumál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum verður øktur 12,6 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

| | | |
|---|---|---|
| -Endurgjald til skipasmíð | - | 5,0 mió. kr. |
| -Barsilsskipanin | - | 2,9 mió. kr. |
| -Vinnuframagrunnurin | - | 1,0 mió. kr. |

| | | |
|---|---|---|
| -Fastur gerðarrættur | - | 1,0 mió. kr. |
| -Granskingarlund | + | 1,0 mió. kr. |
| -Partabrøv | + | 1,6 mió. kr. |
| -Flogferðsla | + | 2,0 mió. kr. |
| -Nýggir landsvegir | + | 5,5 mió. kr. |

**§ 7 Útbúgving og gransking:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í útbúgvingar- og granskingarmálum verður øktur 40,9 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

| | | |
|---|---|---|
| -Yvirtøka av prestagørðum | - | 17,6 mió. kr. |
| -Skúladepil í Suðuroy | - | 17,0 mió. kr. |
| -Miðnámsútbúgvingar | - | 8,9 mió. kr. |
| -Fólkaskúlin | - | 8,1 mió. kr. |
| -Sernámsdepilin | - | 3,6 mió. kr. |
| -Ymsar felagsútreiðslur | - | 2,8 mió. kr. |
| -Musikkskúlar | - | 2,6 mió. kr. |
| -Lestrarstudningur | - | 2,0 mió. kr. |
| -Landsmiðstøð fyri undirvísingarambоð | - | 1,9 mió. kr. |
| -Fiskivinnuskúlin | - | 1,8 mió. kr. |
| -Læraraskúlin | - | 1,8 mió. kr. |
| -Læraraeftirlønir | - | 1,5 mió. kr. |
| -Føroya Læraraskúli | + | 1,0 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjómansskúli | + | 1,2 mió. kr. |
| -Almanna- og heilsuskúli Føroya | + | 1,5 mió. kr. |
| -Nýggj tøkni, SVF og ÚF | + | 2,0 mió. kr. |
| -Skúladepilin við Marknagilsvegin | + | 3,0 mió. kr. |

**§ 8 Almanna-og heilsumál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum verður øktur 67,2 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

| | | |
|---|---|---|
| -Eldrarøkt | - | 15,2 mió. kr. |
| -Landssjúkrahúsið | - | 12,5 mió. kr. |
| -Fyritíðarpensjón | - | 10,7 mió. kr. |
| -Fólkapensjón | - | 10,1 mió. kr. |
| -Viðbót til ávísar pensjónistar | - | 5,4 mió. kr. |
| -Serforsorg | - | 4,9 mió. kr. |
| -Børn og ung | - | 4,4 mió. kr. |
| -Barnaískoyti | - | 3,8 mió. kr. |

| | | |
|---|---|---|
| -Serviðgerð uttanlands | - | 4,3 mió. kr. |
| -Eldrasambýli | - | 3,0 mió. kr. |
| -Vanlig forsorg | - | 2,6 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjúkrahús | - | 2,5 mió. kr. |
| -Stuðul til fyriskipan fyri heimleys | - | 2,4 mió. kr. |
| -Almanna- og heilsumálaráðið | - | 2,1 mió. kr. |
| -Ílegusavnið | - | 2,1 mió. kr. |
| -Viðlíkahald | + | 2,2 mió. kr. |
| -Medicoteknisk tól | + | 2,0 mió. kr. |
| -Heilsuátøk | + | 2,5 mió. kr. |
| -Talgild heilsuskipan | + | 5,0 mió. kr. |
| -Søla av íbúðarbygningum | + | 5,0 mió. kr. |
| -Apoteksverkið | + | 10,0 mió. kr. |

**§ 15 Innlendismál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í innlendismálum verður øktur 40,2 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2007 samanborið við fíggjarlógina 2006.

| | | |
|---|---|---|
| -Strandfaraskip Landsins | - | 35,1 mió. kr. |
| -Lendisfyrisitingin | - | 1,1 mió. kr. |

**§ 20 Inntøkur:**

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 vaksa inntøkur landskassans 450,3 mió. kr. samanbornar við fíggjarlógina 2006.

| | | |
|---|---|---|
| -Rentuinntøkur (netto) | - | 10,6 mió. kr. |
| -Lætti í landsskattinum | - | 60,0 mió. kr. |
| -Útluting úr Fíggingargrunninum | - | 10,0 mió. kr. |
| -Punktgjøld | - | 5,0 mió. kr. |
| -Brennioljugjald | - | 1,0 mió. kr. |
| -Endurrindan av keyps-mvg | - | 5,0 mió. kr. |
| -Skrásetingargjald | + | 20,0 mió. kr. |
| -Útluting frá almennum partafeløgum | + | 10,0 mió. kr. |
| -Kapitalsvinningsskattur | + | 15,0 mió. kr. |
| -Felagsskattur | + | 60,0 mió. kr. |
| -Vanligur landsskattur | + | 205,0 mió. kr. |
| -Kolvetnisskattur (feløg) | + | 5,0 mió. kr. |
| -Meirvirðisgjald | + | 235,0 mió. kr. |

Umframt hetta verða 400 mió. kr. skrásettar undir § 53 sum serinntøkur.

## 5.6 Løgur 2007

Í 2007 verða gjørdar løgur fyri góðar 296 mió. kr., sí talvu 5.7. Løguútreiðslurnar verða nakað minni, tí ætlanin er at selja løgur fyri 35 mió. kr. Meira enn ein triðingur av løguútreiðslunum fara til verkætlanir í Suðuroynni, 68,4 mió. kr. fara til tunnilsgerðina millum Øravík og Hov og 35 mió. kr. fara til Skúladepilin.

Góðar 124 mió. kr. ella góð 40% av løgunum fara til vega- og samferðslunetið kring landið, 71 mió. kr. ella 23% fara til almanna- og heilsuøkið og næstan 54 mió. kr. ella góð 17% fara til útbúgvingarøkið.

Roynt hevur verið at spjatt løgurnar soleiðis landafrøðiliga, at tær hava verið mest virksemisskapandi, har arbeiðsloysið hevur verið størst. Hetta sær út til at hava eydnast, tí stóra arbeiðsloysið, sum var í Suðuroynni, minkar støðugt.

**Talva 5.7: Løguætlanin fyri 2007** (1.000 kr.)

| | | |
|---|---|---|
| § 1 | **Løgtingið** | **2.000** |
| | Løgtingshús | 2.000 |
| § 2 | **Løgmansfyrisitingin o.a.** | **2.000** |
| | Umbygging í Tinganesi | 2.000 |
| § 3 | **Fíggjarmál** | **1.000** |
| | Lønardepil og flyting av Hagstovuni | 1.000 |
| § 5 | **Fiskivinna** | **14.000** |
| | Tilbúgvingarætlan | 9.000 |
| | Útgerð til Magnus Heinason | 3.000 |
| | Trygdarmiðstøðin | 2.000 |
| § 6 | **Vinnumál** | **141.800** |
| | Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni | 5.000 |
| | Granskingarlund | 1.000 |
| | Øravík-Hov | 68.400 |
| | Oyrareingir-Signabø | 4.700 |
| | Skálabotnur-Strendur | 8.000 |
| | Rundkoyring í Gøtudali | 2.500 |
| | Trygging av Norðskálatunnlinum | 6.000 |
| | Brúgv um Fossá í Haldórsvík | 2.000 |
| | Innkoyringarvegur til Tórshavn | 5.000 |
| | Oyri-Norðskáli | 600 |
| | Trygdartiltøk, størri ábøtur og at taka til | 3.000 |
| | Tunnil til Viðareiðis og Norður um Fjall | 500 |
| | Vegagerð í Leirvík | 18.000 |
| | Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunnlar | 2.000 |
| | Kanning av undirsjóvartunnli undir Skopunarfjørð | 3.000 |
| § 7 | **Útbúgving og gransking** | **75.600** |
| | Skúladepil í Suðuroynni | 35.000 |
| | Fiskivinnuskúlin í Vestmanna | 9.800 |
| | Skúladepilin við Marknagilsvegin | 1.000 |
| | Nømingaheim | 1.000 |
| | Studentaskúlin í Hoydølum | 2.000 |
| | Bókasøvn | 500 |
| | Tekniski skúlin í Klaksvík | 5.000 |
| | Kirkjubømúrurin | 200 |
| | Kringvarp Føroya | 500 |
| | Nýggj tøkni Sjónvarp Føroya | 3.000 |
| | Yvirtøka av prestagørðum | 17.600 |
| § 8 | **Almanna- og heilsumál** | **71.000** |
| | Út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum | 33.000 |
| | Eldrasambýli | 18.000 |
| | Klaksvíkar Sjúkrahús | 1.000 |
| | Medicoteknisk tól | 8.000 |
| | Bústovnar | 6.000 |
| | Apoteksverkið | 5.000 |
| § 15 | **Innlendismál** | **1.000** |
| | Strandfaraskip Landsins | 1.000 |
| | **Løgur tilsamans** | **296.300** |
| § 8 | Søla av íbúðarbygningum hjá Landssjúkrahúsinum | 35.000 |
| | **Løguúteiðslur tilsamans íroknað søla av løgum** | **261.300** |

## 5.7 Gongdin í skuld landskassans

Langfreistaða bruttoskuld landskassans var 3,6 mia. kr. ultimo 2005. Av hesum vóru 3,1 mia. kr. lánsbrævaskuld og 500 mió. kr. vóru skuld til danska ríkiskassan.[9] Ultimo 2006 verður langfreistaða bruttoskuldin hjá landskassanum góðar 3 mia. kr.

Orsøkin til stóru minkingina er, at politisk semja er um at brúka einskiljingarinntøkur landsins til niðurgjalding av skuld. Fyrireikingarnar til at einskilja landsins ognir eru komnar væl áleiðis og ein partur av fyrireikingunum er at tillaga kapitalbygnaðin í Føroya Banka, sum tí hevur goldið landskassanum umleið 600 mió. kr. í vinningsbýti í ár. Henda upphæddin verður tí brúkt til at niðurgjalda skuld landskassans.

**Mynd 5.2: Gjaldføri landskassans í Landsbanka Føroya**




Kelda: Landsbanki Føroya.

[9] Hesar 500 mió. kr. eru rentu- og avdráttarfríar so leingi eingin olja er funnin í føroysku undirgrundirini. Er eingin olja funnin innan 2018, verða tær avskrivaðar.

Tað er ásett við lóg, at innlánið hjá landskassanum í Landsbanka Føroya skal vera 15% av BTÚ, landsstýrið hevur heimild at trekkja upp til 70% av minstainnláninum. Í august í ár var innlánið 1,737 mió. kr. ella 237 mió. kr. omanfyri minstakravið, sí mynd 5.2.